

Siri Beate Arntzen, vitanarráðgevi hjá Norsk olje og gass. Mynd: NHO

# Ung eiga at umhugsa útbúgving á kolvetnisøkinum

**Jógvan Hugo Gardar**

22.09.2015 - 18:30

Oljan.fo

Ung eiga ikki at lata seg ræða til ikki at velja útbúgving innan olju- og gassídnaðin. Hetta er arbeiðsmegi som vit fara at hava brúk fyri framyvir, sigur Siri Beate Arntzen, vitanarráðgevi hjá Norsk olje og gass, í samrøðu við heimasíðuna hjá norsku arbeiðsgevarunum, NHO.

Stóru broytingarnar í oljuídnaðinum farna árið hava fingið ungdóm til at velja aðrar útbúgvingar, enn tær sum eru tillagaðar oljuídnaðinum.

- Vit sóu somu gongd í 2000 og 2001. Lágur oljuprísur og nógvar yvirskriftir í miðlunum um kreppuna gjørdi at ung ikki tordu at nema sær útbúgvingar innan oljuídnaðin. Trupulleikin

er at tá tíðirnar aftur gerast betri hjá oljuídnaðinum, so koma vit at mangla fólk, tí ov fá við røttu útbúgvingunum eru á marknaðinum, sigur Siri Beate Arntzen.

Hennara uppgáva hjá Norsk olje og gass er at ferðast rundt til skúlar og har ungdómur annars savnast, og tosa við tey um støðuna, og hvussu týdningarmikið tey meta tað vera at ung leita sær vitan á olju- og gassøkinum eisini.

Hon vísir á at tá kreppan rakti oljuídnaðin í 2000 og 2001, tá hvurvu tveir-tríggir árgangir av nýútbúnum, og hetta gjørdi at ídnaðurin fekk stórar trupulleikar við at finna nokk fólk til øll størvini tá gongdin vendi.

- Vit noyðast at læra av tí sum hendi tá, og gera alt fyri at ung halda fram við at leita sær útbúgvingar á hesum økinum. Tað eru framvegis fleiri enn 200.000 sum arbeiða í norska oljuídnaðinum, og vit koma at seta fólk í nýggj størv framyvir, sigur hon.